**LISTAFÓLKALØNIR 2024**

**Nevndin í Mentanargrunni Landsins hevur tikið avgerð um at veita hesum trimum umsøkjarum listafólkaløn í trý ár fyri at arbeiða burturav við ávíkavíst bókmentum, myndlist og leiklist:**

**Rakel Helmsdal, Jóhan Martin Christiansen og Búa Egason Dam.**

**Bókmentalig faknevnd segði um Rakel Helmsdal:**

Rakel Helmsdal hevur eitt langt lív sum yrkislistafólk aftan fyri seg og eina røð av útgávum, tilnevningum og heiðurslønum. Hon lýsir í sínari umsókn greiðar og realistiskar ætlanir, sum bæði eru framhald av ymiskum, hon hevur givið út, og áhugaverdar ætlanir, ið víðka hennara breiða mentanarliga virksemi. Tað er eingin ivi um við atliti at tí, sum hon longu hevur avrikað, at nógv og dygdargott tilfar fer at spyrjast burtur úr hennara arbeiði, og at tað verður til gangs fyri ung sum eldri.

Í nevndini sótu Sámal Soll og Paula Gaard.

**Myndlistalig faknevnd segði um Jóhan Marin Christiansen**

Jóhan Martin Christiansen hevur markerað seg á føroyska listapallinum við hugtakandi og avbjóðandi samtíðarlist, sum fevnir um gips, readymades, installatiónir, grafikk og videolist. Hann arbeiðir við estetikki og formi, og verkini rúma søgur og spor eftir fólki og støðum. Jóhan Martin Christiansen er í støðugari menning og hevur ein djúptøknan kunnleika til tilfarið, sum hann arbeiðir við. Hann vísir til eldri listasøgu, samstundis sum hann hevur sína egnu dagsskrá..
Verkætlarnirnar, sum Jóhan Martin Christiansen ætlar at arbeiða við, eru gjøgnumhugsaðar og á høgum stigi. Jóhan Martin Christiansen hevur gjørt vart við seg uttanlands og sýnir regluliga fram á føroyska og danska listapallinum. Trý ára listafólkalønhevði givið honum møguleika at halda áfram við støðugu menningini.

Í nevndini sótu Randi Samsonsen og Sólveig Hanusardóttir.

**Faknevndin fyri leiklist, video og film segði um Búa Egason Dam:**

Búi Dam er eitt djarvt multitalent við eyga fyri pallsterkum søgum, ið aftur og aftur vísa føroyingin á ranguni. Søgur, sum við leiklistarligum snildni ofta megna at lýsa, hvussu tað umhvørvið, vit virka í, fer við okkum menniskju bæði so og so. Her fáa serlingarnir - hesi sárbæru, útsettu, forsømdu og órættvíst viðfarnu, umsíður sína rødd.
Búi ferðast óræddur og við hegni tvørtur um fleiri listagreinar. Tað høga listarliga støðið skínur ígjøgnum á øllum leiklistarligum parametrum og eigur sín lut í, at hann so fyrimyndarliga røkkur út um landoddarnar.

Og tá hugt verður at teimum avrikunum á altjóða støði (*Lykkenborg, Lear Kongur, Látur Medusu, v.m)*, og teimum, ið standa fyri framman *(Eitt nú: Hvørvisjónleikur og Seinasti trælurin)*, er eingin ivi um, at Búa Dam eigur at fáa eina 3 ára listafólkaløn. Hetta er ein solid íløga í okkara films- og leiklistaumhvørvi. Og ikki minst okkara samfelag.

Í nevndini sótu Bárður Persson, Jonna Fritsdóttir Mortensen og Turið Johannesen.

Umsóknir á sera høgum stigi

Inn komu 15 umsóknir, flestu teirra vóru á sera høgum listaligum stigi. Torført hevur verið at taka dagar í millum dygdargóðu umsóknirnar. Samstundis fegnast vit um fjølbroytnið og gróðurin, sum er á teimum ymsu yrkislistaøkjunum.
Endamálið við listafólkalønunum er at bøta um umstøðurnar hjá yrkislistafólkum, og lønirnar verða veittar umsøkjarum við støði í verkevni ella verkætlan, sum eftir nevndarinnar meting hava listalig og faklig dygdareyðkenni. Listafólkið skal í einum trýára skeiði arbeiða burturav við síni list. Listafólkalønin svarar til læraraløn á fólkaskúlans lønarstigi 21, stig 1.

Nevndarinnar vegna

Hedvig Westerlund-Kapnas, forkvinna
Lützenstrøð 4, tann 29. apríl 2024